DAGSINS MEINING

Eykajáttanarlógir

Eykajáttanir eiga at verða so fáar og smáar sum møguligt. At stovnar koma fleiri ferð um árið og biða um eykajáttanir til rakstur, er eftir okkara tykki tað sama sum at fara út um játtan. Nógvu eykajáttanarlógirnar vísa annaðhvørt, at raksturin av hesum samfelagnum gongur verri, enn hann gekk frammanundan, ella at eingin í systeminum torir at taka abýrgd av einum tveyoyra, og tí skumpar alt á tingborð.

Vit hava sæð eykajáttanurumbønir, ið hava havt grundgeving, at um eykajáttanin ikki varð givin, so vórðu skip ikki koyrd í dokk, fólk søgd upp o.s.fr. Løgtingið kann illa annað enn at játta slíkum umbønum.

Ein stovnur fær ein játtan, og tá árið er liðugt, skal stjórin standa til svars yvirfyri landstýrismanninum, ið so skal standa til svars yvirfyri Løgtinginum. Hetta er grundin til at vit betala stjórum og landsstýrismonnum væl. Ikki skulu revolvaraeykajáttanir hjálpa hesum at turka eventuel vánalig rakstrarúrslit ella ringa planlegging uppí eykajáttanir, so hesir eftir fleiri eykajáttanir kunnu fortelja hvussu nógvar túsund krónur teir hava eftir av játtanunum.

Stovnar fáa eina játtan, og so kann landstýrismaðurin vurdera eftir hvørt fíggjarár, um avleiðingar skulu takast. Eitt er altíð vist, og tað er, at ein fíggjarætlan ongantíð heldur uppá krónuna. Hon vil altíð verða eitt sindur yvir ellla eitt sindur undir.

Í Danmark er vanligt, at ein samlað eftirjustering kemur fyri fíggjarlógina, og tá eru tær ábreiðslur, næsar og annað, ið skulu gevast, givnar av ráðharrum. Ein ruddilig skipan, ið samlar upp aftaná, og kann Fólkatingið so krevja ráðharrar til svars, um onkur er farin ov langt útum. Í Føroyskum sambandi kundi verið áhugavert at vitað, hvat Stýri eigur flestu eykajáttanirnar í prosentum av samlaðari játtan, og burdi tann landstýrismaðurin verið tikin í Fíggjarnevndina til eina samrøðu.

Finnbogi Arge fíggjarnevndarformaður er ein av fremstu fortalarum fyri hendan óvana, við fleiri eykajáttanarlógum. Hetta er ikki so løgið, tí hesin óvanin byrjaði av álvara undir hansara tíð sum landsstýrismaður. Hann samanber við "vælriknar privatar fyritøkur". Nú er tað so ymiskt, sum man hevur at sammeta við, men ein fyritøka, ið skal justera sítt budgett radikalt nógvar ferðir um árið er ikki væl rikin, óansæð um hon framleiðir matvøru, selur innfluttar vørur ella er ein almennur stovnur.

Løgtingið má kunna krevja av landstýrismonnum at teir planleggja nakrar mánaðar fram, so at teir ikki koma malandi í tíð og ótíð við umbøn um eykajáttan.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Samgongan aftur í hernað ímóti útjaðaranum

Finnleif Guttesen
borgarstjóri

Sum ikki einaferð eru fíggjarmálaráharrin og samgongan farin í hernað ímóti útjaðaranum, hesa ferð er tað eftir føroyskum handverkarum, sum arbeiða uttanlands.

Tað er komið áheitan til kommununa um at gera vart við, at um fleiri handverkarar, sum arbeiða uttanlands, koma heim tí frádrátturin fellur burtur, verður galin endi í útjaðarinum tí tað verður ov lítið arbeiði til allar, so at eingin kann yvirliva.

Hesir handverkarar sum í dag gjalda skatt til kommununu og land, hava so tvey í at velja:

- Flyta heim til kommununa, har ov lítið arbeiði verður, tí ov nógvir eru um boðið, hetta kunnu teir ikki liva við og verða tí noyddir til at arbeiða í miðstaðarøkinum fyri lægri løn, enn teir hava uttanlands og nógv hægri kostna fyri bústað og kost enn uttanlands.
- Flyta úr kommununi til útlandið, tí inntøkan er nógv betri og kostnaðurin lægri. Somuleiðis hava teir møguleikan til at arbeiða í Føroyum og fáa ein frádrátt uppá kr. 6oo-700,- um samdøgrið.

Við hesi dáragerð hevur fíggjarmálaráharrin og samgongan enn einaferð ætlan um at taka inntøkur frá kommununum í útjaðaranum og harvið gera grundarlagið fyri økismenning til einkis.

Bræv til Frank Jensen

Høgnin Hoydal,
selvstyre og justitsminister

Kære Frank Jensen,

Tak for vores møde i København d. 26. september d.å.

Jeg har orienteret Landsstyret og Lagtingets udenlandsnævn om de forslag, der blev drøftet på mødet.

Jeg vil tilkendegive, at vi er meget tilfredse med, at vi for de lovtekniske spørgsmål kan finde en løsning, som begge parter kan være tilfredse med, og at landsstyret er positivt overfor forslaget om at indlede en samarbejdsproces om overtagelse af politiet og retsvæsenet samt dertil knyttede sagsområder, hvor forberedelserne mellem danske og færøske embedsmænd kan indledes med det samme og afsluttes ultimo 2002.

Landsstyret foreslår derfor følgende praktiske fremgangsmåde:

- Landsstyret har udpeget en færøsk embedsmandsgruppe, ledet af afdelingschef Rúni Joensen, der refererer til den færøske justitsminister.
- Justitsministeriet vælger en tilsvarende embedsmandsgruppe.
- De to ledere får til opgave at tilrettelægge arbejdsplan og mødeplan.

Under hensyntagen til at arbejdet skal tilrettelægges således, at resultatet af arbejdsgruppens overvejelser kan afsluttes ultimo 2002, har jeg bedt Rúni Joensen om at kontakte din departementschef snarest for at tilrettelægge og igangsætte arbejdet.

Val

Sjúrður Hansen
Gøta

Samstarv har Oyndarfjørður, Gøta, Lorvík og Fuglafjørður vóru við , kundu verið ein góð byrjan, sum møguliga Skálafjarðar Kommunala seinni gjørdist Skálafjarðar Kommuna.

Hví ikki velja til eitt slíkt ráðgevandi Skálafjarðar kommunuting, og Norðoya Kommunuting o.s.fr, áðrenn endaliga samanlegging.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Eiðis kirkja 120 ár

Ein seinkað kvøða til Eiðis kirkju á 120 ára degnum 18. september 2001

Fyri viku síðani, týsdagin 18. september 2001, vóru 120 ár liðin, síðani Eiðis kirkja varð vígd. Hetta má sigast at vera ein søguligur dagur í bygd okkara. Kirkjan er tann bygningur, sum á ein serligan hátt setir sín dám á bygdarlívið, kirkjan er andaliga heim okkara, har koma vit saman fyri at hoyra hvat Gud hevur at siga okkum hvørja ferð vit koma saman um orðið, bæði í gleði og sorg.

Tað hevur altíð ligið djúpt í fólki okkara at hava virðing fyri tí, ið heilagt er, tað veri seg á sjógvi ella landi, í bjørgum, í skorðum, eftir seyði, fugli, fiski ella grind. Alt hetta, sum eg her havi nevnt, varð gjørt fyri at lívbjarga sær og sínum í gerandisdegnum.

Umframt at hetta er bæði gagnligt og gott, so er hetta okkara mentan, eisini í dag. Men vit mega viðganga, at her er nógv broytt á øllum økjum tey seinastu árini. Men hóast hesa broyting, so er Gud við Jesusi Kristi tann sami, soleiðis sum skrivað stendur í Hebr. 13,8. Jesus Kristus er í gjár og í dag hin sami og um allar ævir.

Hvønn týdning hevur so kirkjan fyri hvønn einstakan av okkum í dag? Stendur hon bara sum eitt bygdarprýði, ella er hon bygningurin, sum savnar bygdarfólkið saman tá kirkjuklokkan kallar. Kirkjuklokkan er sanniliga eisini eitt amboð, sum Gud brúkar í tænastu síni; latum okkum tí takka Gud fyri, at vit í kirkjum okkara hava bæði klokkarar, deknar og urguleikarar, sum við gleði og ágrýtni gera henda týðandi gerning í Guds ríkis víngarði, soleiðis at Jesus verður neyðugur í lívi okkara, neyðugur fyri okkum øll, bæði stór og smá. Prædikustólurin, lesipultur-in, minnir okkum á tað skrivaða orðið, sum verður prædikað av presti, dekni, sum lesur prædikur, sum ymiskir prestar hava skrivað okkum til lærdóms í kristinlívi okkara.

Doypifundurin, sum minnir okkum á at ein dag vóru vit borin til dópin, ja, longu á lívsins morgni vóru vit løgd í Guds almáttugu sterku hond, og har ljóðaðu hesi lívsælu orðini yvir okkum: »Mær er fingið alt valdið í himli og á jørð. Farið tí og gerið øll fólkasløgini til lærusveinar mínar, við tað at tit doypa tey til navn faðirsins og sonarins og hins heilaga anda, og við tað at tit læra tey at halda alt tað, ið eg havi boðið tykkum. Og sí, eg eri við tykkum allar dagar, alt til veraldar enda«.

Altarborðið stendur har og vit verða øll boðin við til at eta Jesu likam og drekka hansara blóð til áminningar um at hann, sum læt lívið fyri okkum og stóð upp úr grøvini páskamorgun, hann er til staðar okkara millum, har sum orðið verður prædikað, børnini verða doypt, likam hansara verður etið, blóð hansara verður drukkið (breyð og vín).

Eg vil her undirstrika hvønn týdning hetta hevur havt og framvegis hevur fyri meg og mítt kristinlív. Hettta er kjarnin í kristindóminum, at Jesus verður neyðugur í lívi okkara.

Lat tað tí beinanvegin verða sagt, at kirkja og mission hoyra saman, at kirkja, sum ikki drívur mission, er ikki nøkur kirkja. Latum okkum tí gera brúk av kirkjuni sum andaliga heim okkara, og har ígjøgnum fáa ta somu andaligu føði, sum okkara forfedrar hava fingið gjøgnum øldir í bygd okkara og víða hvar um land okkara.

Eg vil tí til endans ynskja Guds signing yvir kirkju okkara og biðja um at Gud má senda okkum eina veking, soleiðis at bygdarfólk okkara hoyrir kirkjuklokkuna og gongur kirkjuvegin, sum forfedrar okkara hava gjørt undan okkum. Gud signi tykkum, sum gera tænastu innan kirkju okkara.

Kjartan Stakksund

Hvar eru Føroyar í norrønum samstarvi?

TÍÐINDASKRIV
Norrøna Felagið í Føroyum

Hósdagin fer Norrøna Felagið í Føroyum undir limatiltøkini fyri komandi veturin. Fram til ársskiftið verða fundir felagsins í Listaskálanum. Eftir ársskiftið verða fundirnir í Norrøna Felagnum í Norðurlandahúsinum.

Lagt verður fyri hósdagin, tá teir báðir politikararnir Jógvan við Keldu úr Fólkaflokkinum og Dan Reinert Petersen úr Javnaðarflokkinum greiða frá arbeiðnum í Norðurlandaráðnum. Fundurin verður í Listaskálanum mikukvøldið klokkan 19:30, har høvi verður at kjakast um karmar og úrslit úr føroyskari umboðan í Norðurlandaráðnum.

Síðst í hesum mánaðinum fer Norðurlandaráðið at hava fund í Keypmannahavn, har sonevnda "Vísmannafrágreiðingin" verður viðgjørd. Jóannes Dalsgaard umboðaði Føroyar í norrøna vísmannabólkinum, sum undir heitinum "Öppet för världens vindar", hveur latið eina áhugaverda frágreiðing úr hendi. Vísmannafrágreiðingin vísir á ikki færri enn 78 ítøkilig uppskot at broyta, styrkja, ella endurnýggja norrøna samstarvið.

Samstundis hevur Foreningene Nordens Forbund, sum er samskipanin av norrønu feløgunum í øllum Norðanlondum, givið út ritið "Norden i tiden og verden". Her verður fólksliga norrøna samstarvið greinað og nevnd verða 27 uppskot um ábøtur á hesum øki. Millum annað at styrkja Útnorður og at viðgera sonevndu nær-økini av nýggjum. Sum er, verða Kolanesið, Sankta Pætursborg og Baltisku londini mett sum norrøn nærøki.

Fimmti ár

Bæði Norðurlandaráðið og Norrøna Felagið í Føroyum fara um tey fimmti í vetur. Hin 19. november verða fimmti ár síðani Norrøna Felagið í Føroyum varð stovnað í Sjónleikarahúsinum í Havn. Fyrsti formaður í felagnum var Heðin Brú.

Fimmti ára hald felagsins verður í Müllers Pakkhúsi í Havn leygardagin hin 17. november, m.a. við framsýning av brævaskiftinum, sum í 1951 elvdi til stovnanina av einum sjálvstøðugum norrønum felagi í Føroyum. Høgni Hoydal, sum er landstýrismaður í norðurlandamálum, fer at halda røðu við hetta høvi.

Fimmti ára haldið hjá Norðurlandaráðnum verður við ymsum tiltøkum í øllum Norðanlondum út á várið 2002, millum annað einum filmi, sum ungi grønlendski filmsleikstjórin Inuk Silis Høgh stendur fyri. Við í filminum, sum vendir sær til ung, er Sára úr Vestmanna. Saman við øðrum norrønum ungdómum hevur hon verið umborð á víkingaskipinum Gaia í Noregi, har filmurin er tikin.

Øll kunnu gerast limir í Norrøna Felagnum í Føroyum, sum í løtuni hevur 300 limir. Í felagsnevndini sita nú: Birgir Kruse formaður, Heðin M. Klein næstformaður og nevndarlimir eru Bárður Jákupsson, Hallstein Sigurðsson og Jórun Simonsen.

Dan Reinert Petersen

Jógvan við Keldu